# Klubbtilboð á Tinghúsvegnum – Samandráttur frá eftirlitinum

Á Tinghúsvegnum í Havn eru tvey klubbtilboð hjá Almannaverkinum: *Klubb Trivni* og *Smíliklubburin*. Talan er um støkk-inn tilboð, har ung kunnu koma, uttan at nøkur visitering er framd, og tilboðið er bert opið 15,5 tímar um vikuna og bara gerandisdagar. Orsakað av hesum er ein øðrvísi frágreiðing skrivað, enn til hini tilboðini, har innsend skjøl eru gjøgnumgingin, samandráttur er gjørdur av samrøðum, og nakrar námsfrøðiligar reflektiónir eru givnar.

Smíliklubburin, stovnaður í 2015, er eitt frítíðartilboð til næmingar á serbreytum og onnur ung. Tilboðið er opið tríggjar seinnapartar um vikuna. Klubburin leggur dent á sosialar relatiónir við ymiskum virksemi eftir ynski frá teimum ungu.

Klubb Trivni, sum hevur røtur í gomlu Almannastovuni, veitir frítíðartilboð til fólk við menningartarni. Klubburin, sum er opin tvey kvøld um vikuna, leggur dent á sosialan trivnað, vinabond og fjølbroytt tiltøk.

Samrøður við leiðslu, starvsfólk og luttakarar staðfesta, at trivnaðurin er góður, hóast ymiskar avbjóðingar við uppmøting og málbólki.

Í frágreiðingini mælir eftirlitið klubbtilboðnum til at umhugsa, um fleiri serstøk tiltøk skulu gerast, sum draga fleiri borgarar til klubbarnar. Ein týdningarmikil spurningur er síðani, hvussu mann tryggjar javnvág millum reglulig tiltøk og serstøk tiltøk, har ið reglulig tiltøk skapar stabilitet, meðan tey serstøku tiltøkini draga fleiri til. Somuleiðis eigur at verða kannað, um klubbtilboðið skal styrkja samstarvið við heimini, Glasir, áhugafeløg og onnur tilboð í Almannaverkinum.

Almannaverkið er farið undir eina verkætlan kallað “eitt gott lív á egnum beinum”, og klubbarnir kunnu møguliga vera eitt tiltak, sum er við til at stuðla undir eitt sjálvstøðugt lív hjá málbólkinum.

Eftirlitið gevur ikki nakra áheitan um, at nakað er kritiskt við klubbunum, sum má fáast í rættlag beinanvegin.